# Framleiðslu formenn

**Til felag okkara**
**P/f P. P. Faroe Pelagic, Kollafirði**

søkja vit eftir fólki til at starvast sum dagligir leiðarar í framleiðsluni á virki okkara.

Felagið varð sett á stovn í desember 2009 og er nú í gongd við at víðka um virksemi á virkinum. Í løtuni framleiðir felagið í høvuðsheitum frystan fisk. Um neyðugt verður framleitt alt samdøgrið. Felagið hevur ætlanir um at økja framleiðslunøgdina upp í 1.000 tons um dagin. Hetta verður ætlandi klárt í mai í ár. Í árinum er ætlanin eisini at byrja framleiðslu av kruvdum/avhøvdaðum, flaki og flaktum.

Tey, sum setast skulu í starv, mugu hava góðan kunnleika til øll viðkomandi øki viðvíkjandi dagligu framleiðsluni av fiski á virki okkara. Royndir innan líknandi arbeiði er ein fyrimunur.

Hetta er ein frálíkur møguleiki at gerast partur av tí, ið kemur at vera ein tann størsta framleiðslueindin í Evropa.

Tú kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við framleiðslustjóran. Væntað verður, at tú hevur viðkomandi útbúgving ella upplæring og praktiskar royndir á økinum, og at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur initiativ til sjálvur at taka stig til at fremja tær neyðugu arbeiðsuppgávurnar. Tú kemur at hava ábyrgd av framleiðslu og starvsfólkunum á vakt. Umsøkjarin má vera fjølbroyttur, kreativur, arbeiðssamur, og duga at leiða og samskipa arbeiðið.

Kunnleiki til enskt – bæði í skrift og talu – er ein fyritreyt, tí ein partur av samskiftinum verður á enskum.

Størvini skulu setast so skjótt sum gjørligt. Í seinasta lagi í apríl 2011.

Løn sambært avtalu.

Ynskjast nærri upplýsingar, kann ringjast til Aad de Jong (+31 653 266167) ella senda teldupost til management@ppfaroe.fo.

Allar umsóknir, sum sjálvsagt verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til
**P/f P.P. Faroe Pelagic**
**Postboks 49**
**FO-410 Kollafjørdur**

ella helst við telduposti á:
management@ppfaroe.fo
í seinasta lagi 20. mars 2011.

RUNAVÍKAR KOMMUNA

# Barnahúsið Sellin á Skála

Søkt verður eftir námsfrøðingum til Barnahúsið Sellan at byrja ávikavist 01. apríl og 01. aug. 2011 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja er:**
*6 Námsfrøðingar* til Barnahúsið Sellan 30 t/v. til 35 t/v. til vøggu- ella barnagarsstovu.
Eitt av hesum størvum skal setast 1. apríl á barnagarðsstovu á 30 t/v .

*1 Avloysara* á 25 t/v at byrja 15. aug. 2011
Á stovninum eru 2 vøggustovur og 2 barnagarsstovur.

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn. Vit ynskja eisini at tú sært allar teir møguleikar ið nátturan hevur, og gert brúk av teimum í dagliga arbeiðinum.

Stovnurin er nýggju og tú sum starvsfólk er við til at mynda tann nýggja stovnin, og harvið skapa eina stovnsmentan.

**Setanarviðurskifti:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin námsfrøðingur søkir størvini verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað starv.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 212252/667160 www.123hjemmeside.dk/Dagstovnurin

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til Runavíkar Kommunu í seinastalagi 26.mars 2011.

**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur 26 · Postsmoga 139 · FO-600 Saltangar

# Ársfundur

Ársfundurin fyri limir í FK handlunum í Dr. Jacobsensgøtu og í Hoyvik verður í matstovuni í Hoyvík týskvøldið 15. mars 2011, kl. 19.30.

Skrá sambært viðtøkunum.

Allir limir kunnu møta.

***Limanevndin***

**Føroya Keypssamtøka**

## Mini íbúð til leigu

Mini íbúð, 12 m², í vesturbýnum til leigu.
Bert egnað til eitt fólk.
Egin inngongd, 2 rúm + mini køkur og mini bað + wc.
Friðarligt umhvørvi.

***Tlf. 217300***


www.sosialurin.fo

Tekna teg sum haldara nú fyri einans
**400,- um ársfjórðingin**




nær sum helst, hvar sum helst

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 3 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

Sosialurin Boks 76 · FO-110 Tórshavn




Altíð tað nýggjasta